MENTAMÁLARÁÐIÐ

Til Advokatvirkið
J.H. Schrötersgøta 20
FO-110 Tórshavn

Dagfesting: **14. august 2018**
Tygara ref.:
Máltal.: **18/00001-116**

*Stílað Sigmundi Poulsen, advokati*

**Avgerð í sambandi við kæru av avgerð hjá Kringvarpi Føroya viðvíkjandi Liljan Weihe**

Við telduposti, dagfestur 24. mai 2018, kærdi Sigmund Poulsen, adv., vegna Liljuna Weihe (hereftir nevnd, "kærarin"), avgerðina hjá Kringvarpi Føroya (hereftir nevnt, "KvF"), dagfest 24. mai 2018, hareftir kærarin varð flutt frá at vera "Leiðari fyri Aktuelt" til eitt akademiskt starv í KvF við nøkrum í dagførda ætlanarskrivinum frá 7. mai 2018 nærri nágreinaðum uppgávum.

**Málsgongd**
Tann 21. desember 2017 fekk kærarin handað eitt uppsagnarskriv frá KvF. Uppsøgnin varð grundgivin við, at kærarin hevði framt grovan illoyalitet mótvegis kringvarpsstjóranum og stovninum, tí hon tilvitað hevði skatt umdømið hjá stovninum og álitið á leiðsluna millum starvsfólk á stovninum og onnur uttanfyri standandi við at hava vent sær til stýrisformannin við ákærum og skuldsetingum móti kringvarpsstjóranum og við at hava likið hesar upplýsingar til Sosialin.

Kærarin kærdi uppsøgnina til Mentamálaráðið (hereftir nevnt, "MMR"), sum við avgerð, dagfest 20. apríl 2018, ógildaði uppsøgnina.

Í avgerðini hjá MMR frá 20. apríl 2018 stendur m.a.:

> *"Eftir einari samlaðari heildarmeting av støðu kærarans sum tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya, útbreiðslu og innihald í framsagnum (ytringum) kærarans, verður tað ikki mett, at partar av framsagnunum hjá kæraranum liggja innan fyri karmarnar av skrivi- talu og framsøgufrælsinum hjá alment settum starvsfólkum. Hetta verður lutvíst grundað á, at kærarin er partur av leiðsluni í Kringvarpi Føroya, at kærarin ikki hevur úttalað seg rætt um ávís týðandi viðurskifti innan sítt egna starvsøkið (pkt. 4.4.5), og kærarin ikki hevur gjørt greitt, at hon úttalar seg egna vegna sum privatpersónur (pkt. 4.2). Mett verður heldur ikki, at kærarin í leiklutinum sum tíðindaleiðari hevur umrøtt stjóra sín á ein sømiligan hátt (pkt. 4.4.2 og pkt. 4.4.3), og at møguliga ber eisini til at siga, at kærarin hevur brotið tagnarskylduna, sbr. pkt. 4.4.4.*
>
> *Vísandi til hesar umstøður verður ikki mett, at kærarin hevur sýnt rættan leiðsluatburð, og kærarin kann tí sigast at hava sett trúvirðið hjá stovninum í vága."*

Hóast hetta legði MMR í avgerð sínari um at ógilda avgerðina hjá KvF um at siga kæraranum úr starvi við fríttstilling dent á, at KvF samsvarandi fyrisitingarrættarliga proportionalitetsprinsippinum átti at roynt aðrar minni víðfevnandi loysnir, áðrenn farið var undir at siga kæraran úr starvi.

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Tann 24. apríl 2018 fekk kærarin handað eitt nýtt ætlanarskriv frá KvF, har upplýst varð, at ætlanin var at flyta kæraran *"í annað starv innan setanarøkið"*. Í ætlanarskrivinum varð grundgivið soleiðis fyri ætlanini um at flyta kæraran í annað starv:

> *"Leiðsluatburður tín var so grundleggjandi skeivur, at eg ikki kann hava álit á, at tú kanst røkja uppgávuna sum tíðindaleiðari á nøktandi hátt, ei heldur at tú kanst vera partur av leiðslubólki stovnsins. Samstundis kann eg staðfesta, at tú hevur nakrar dygdir sum royndur journalistur við akademiskari útbúgving og analytiskum førleikum, sum KVF kann gagnnýta til at styrkja tíðindaflutningin. Tí er ætlan mín, at tú framyvir skal røkja eitt akademiskt starv á Aktuelt deildini, har tú við tilvísing til deildarleiðaran fyri Aktuelt skal røkja nakrar týðandi uppgávur, sum eru nærri nágreinaðar niðanfyri."*

Um tað nýggja starvið, sum ætlanin var, at kærarin skuldi flytast í, varð í ætlanarskrivinum upplýst niðanfyri standandi:

> *"Arbeitt hevur verið við eini ætlan um at styrkja tíðindaflutningin innan nøkur ítøkilig økir, sum tú lutvíst eisini sjálv hevur víst á. Nýggja starvið á Aktuelt verður ein faklig stuðulsfunktión hjá deildarleiðaranum og dagligu redaktørunum:*
>
> - *Gera uppsøkjandi og gravandi reasearch, so at 'pipeline' av viðkomandi og tíðindaverdum søgum gerst størri og breiðari. Millum annað hetta tilfar brúka redaktørarnir saman við tíðindaleiðaranum til at taka støðu til hvørjar søgur skulu raðfestast og dekkast.*
> - *Gera regluligar greiningar av tíðindaflutninginum, sum tíðindaleiðarin skal brúka til at tryggja, at KVF dekkar øll samfelagsliga viðkomandi økir umframt landafrøðiliga dekkandi.*
> - *Fylgja altjóða tíðindaflutninginum og rákum við atlit til at eyðmerkja hvørji rák eiga at vera dekkaði av KVF søgd við einum føroyskum vinkli. Redaktørar og tíðindaleiðarar brúka hetta sum grundarlag fyri teirra støðutakan til val at dekningi.*
> - *Samskipa eftirmetingar av størri dekningum og sendingum í samráð við deildarleiðaran.*
> - *Samskipa førleikamenning av journalistum í samráð við deildarleiðaran.*
> - *Luttaka í verkætlan við at styrkja um okkara tíðindaflutning á netinum og sosialu miðlunum.*
> - *Gera ein bruttolista av møguligum 'detektorlíknandi' søgum úr miðlaheiminum, sum ein redaktørur fyri komandi 'detektorlíknandi' vikusending okkara í vetrarskránni 2018/19 kann velja burtur úr og viðgera.*
> - *Aðrar ad hoc arbeiðsuppgávur.*
>
> *Raðfesting av ymsu arbeiðsuppgávunum verður gjørd í samráð við deildarleiðaran."*

Um lønina stóð soleiðis í ætlanarskrivinum:

> *"Vísandi til at talan er um akademiskt starv verður tú lønt sambært sáttmálanum millum BLF og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 9 samsvarandi starvsaldri tínum eftir lokna útbúgving. Tú varðveitir tó verandi løn tína næstu 5 mánaðarnar. Lønarmunurin*

*millum verandi mánaðarløn og nýggju mánaðarløn tína í verandi sáttmála er kr. 3.244,53, harumframt kemur ein munur í eftirlønargjaldinum á kr. 486,68."*

Í hoyringarsvari, dagfest 1. mai 2018, gjørdi advokatur kærarans m.a. vart við, at talan ikki kundi verða um eina flyting, sum var fevnd av leiðslurættinum, men at talan í staðin var um eina uppsøgn við tilboði um nýtt starv.

Tann 7. mai 2018 fekk kærarin eitt dagført ætlanarskriv um *"flyting innan setanarøkið"*. Í tí dagførda setanarskrivinum verður tað, sum framgekk av ætlanarskrivinum frá 24. apríl 2018, í stóran mun endurtikið. Nakað var tó broytt og lagt afturat í omanfyri nevndu brotum.

Brotið viðvíkjandi grundgevingunum fyri ætlanini um at flyta kæraran í annað starv var í dagførda ætlanarskrivinum frá 7. mai 2018 soljóðandi:

> *"Leiðsluatburður tín var so grundleggjandi skeivur, at eg ikki kann hava álit á, at tú kanst røkja uppgávuna sum tíðindaleiðari á nøktandi hátt, ei heldur at tú kanst vera partur av leiðslubólki stovnsins. Í KVF starvast áleið 85 starvsfólk í føstum starvi undir leiðslu av teimum fýra deildarleiðarunum í leiðslubólkinum, tí er alneyðugt, at eg sum evsti ábyrgdarhavandi av stovninum kann hava fult álit á hesum deildarleiðarum, sum eg leiði stovnin ígjøgnum. Tí meti eg ikki, at ein átala ella ávaring røkkur endamálinum við inntrivinum. Samstundis kann eg staðfesta, at tú hevur nakrar dygdir sum royndur journalistur við akademiskari útbúgving og analytiskum førleikum, sum KVF kann gagnnýta til at styrkja tíðindaflutningin og tilfarsframleiðsluna annars. Tí er ætlan mín, at tú framyvir skal røkja eitt akademiskt starv í KVF, har tú við tilvísing til kringvarpsstjóran skal røkja nakrar týðandi uppgávur, sum eru nærri nágreinaðar niðanfyri."*

Um tað nýggja starvið, sum ætlanin var, at kærarin skuldi flytast í, var í dagførda ætlanarskrivinum upplýst niðanfyri standandi:

> *"Arbeitt hevur verið við eini ætlan um at styrkja tíðindaflutningin innan nøkur ítøkilig økir, sum tú lutvíst eisini sjálv hevur víst á. Nýggja starvið á Aktuelt verður ein faklig stuðulsfunktión hjá deildarleiðaranum og dagligu redaktørunum:*
>
> - *Gera uppsøkjandi og gravandi reasearch, so at ´pipeline´ av viðkomandi og tíðindaverdum søgum gerst størri og breiðari. Millum annað hetta tilfar brúka redaktørarnir saman við tíðindaleiðaranum til at taka støðu til hvørjar søgur skulu raðfestast og dekkast.*
> - *Gera regluligar greiningar av tíðindaflutninginum, sum tíðindaleiðarin skal brúka til at tryggja, at KVF dekkar øll samfelagsliga viðkomandi økir umframt landafrøðiliga dekkandi.*
> - *Fylgja altjóða tíðindaflutninginum og rákum við atlit til at eyðmerkja hvørji rák eiga at vera dekkaði av KVF søgd við einum føroyskum vinkli. Redaktørar og tíðindaleiðarar brúka hetta sum grundarlag fyri teirra støðutakan til val at dekningi.*
> - *Samskipa eftirmetingar av størri dekningum og sendingum í samráð við deildarleiðarar og kringvarpsstjóra.*

- *Samskipa førleikamenning av journalistum í samráð við deildarleiðarar og kringvarpsstjóra.*
- *Luttaka í verkætlan við at styrkja um okkara tíðindaflutning á netinum og sosialu miðlunum. Ein tvørgangandi verkætlan fyri bæði Aktuelt og Mentan.*
- *Gera ein bruttolista av møguligum 'detektorlíknandi' søgum úr miðlaheiminum, sum ein redaktørur fyri komandi 'detektorlíknandi' vikusending okkara í vetrarskránni 2018/19 kann velja burtur úr og viðgera.*
- *Aðrar ad hoc arbeiðsuppgávur.*

*Flestu av nevndu arbeiðsuppgávunum hava higartil verið partur av arbeiðsøkinum hjá deildarleiðaranum á Aktuelt, sum framyvir betri fær hugsavna seg um at leiða og menna starvsfólkahópin og at skipa tilfarsframleiðsluna á mest skynsama og dygdargóða hátt.*

*Raðfesting av ymsu arbeiðsuppgávunum verður gjørd í samráð við kringvarpsstjóran."*

Um lønarviðurskiftini stóð soleiðis í dagførda ætlanarskrivinum:

*"Vísandi til at talan er um nakrar av somu arbeiðsuppgávunum, sum higartil hava ligið í starvinum sum deildarleiðari fyri Aktuelt, varðveitir tú verandi løn tína."*

Í hoyringarskrivi, dagfest 14. mai 2018, gjørdi advokatur kærarans m.a. enn einaferð vart við, at talan var ikki um eina *"flyting innan setanarøkið"*. Víðari vísti advokatur kærarans m.a. á niðanfyri standandi:

*"Tað starvið, sum tú her strikar upp, er ikki í samsvari við setanarøkið hjá Liljuni Weihe. Ábyrgdar- og uppgávuøkið hjá Liljuni Weihe, í hesum føri tað sama sum setanarøkið, er fyrst og fremst*

- *at leiða og menna tíðindatænastu stovnsins*
- *at tryggja at tíðindini eru viðkomandi, álítandi, óheft, kritisk og skjót*
- *at journalistikkurin á miðalpallum KVF er í støðugari menning*

*Hetta er samsvarandi setanartreytum hennara, sum standa at lesa í lýsingini, sum eg hefti við undanfarna hoyringssvari, og hetta er eisini í samsvari við tey faktisku viðurskiftini."*

Tann 24. mai 2018 avgjørdi KvF, vísandi til dagførda ætlanarskrivið frá 7. mai 2018, at fremja tær starvsbroytingar, sum vóru fráboðaðar í ætlanarskrivinum.

Í avgerðini hjá KvF stendur m.a.:

*"Talan er ikki um eina uppsøgn, men um eina flyting innan setanarøkið. Sum greitt frá í ætlanarskrivinum hevur tú framhaldandi eitt týðandi og harvið eisini eftir mínum tykki eitt tignarligt starv.*

*Sum nevnt í ætlanarskrivinum, so eru tær flestu av uppgávunum tær somu sum higartil. Tú kemur eisini sum higartil at hava tilvísing til kringvarpsstjóran. Tú varðveitir av somu orsøk somu løn sum higartil.*

*Sigmund Poulsen, advokatur, skrivar eisini, at grundin fyri at siga teg upp er ikki tann sama sum upprunaliga.*

*Eg kann í tí sambandi endurtaka, at talan er ikki um eina uppsøgn, men um eina flyting innan setanarøkið.*

*Grundgevingin fyri at flyta teg innan starvsøkið er sum greitt frá í ætlanarskrivinum, har eg havi víst til álvarsomu og greiðu niðurstøðurnar hjá MMR, og at MMR ikki metir, at tú hevur víst rættan leiðsluatburð, og at tú kann sigast at hava sett trúvirðið hjá stovninum í vága.*

*Fyri at málið skal verða fult upplýst, og fyri at misskiljingar ikki skulu verða, hava tú og Sigmund Poulsen, advokatur, av somu orsøk fingið høvi til at gera viðmerkingar til hesa ætlan. Tit hava í sama viðfangi fingið høvi til at gera viðmerkingar til grundgevingina fyri hesi ætlan.*

*Tykkara viðmerkingar eru sum nevnt viðgjørdar. Men viðmerkingarnar hava ikki givið mær høvi at broyta ætlan.*

*Tú tekur við nýggju uppgávunum mánadagin 28. mai 2018 til vanliga arbeiðstíð..."*

Sigmund Poulsen, adv., kærdi sum nevnt sama dag avgerðina hjá KvF til MMR.

**Meting Mentamálaráðsins**
Kærarin varð upprunaliga sett í starv sum *"Leiðari fyri Aktuelt"* í KvF.

Sambært lýsingini eftir *"Leiðara fyri Aktuelt"*, sum varð nýtt, tá kærarin varð sett í starv, er uppgávan hjá *"Leiðaranum fyri Aktuelt"* at *"leiða størstu redaksjónina í landinum við tíðindum frá morgni til á kvøldi."*

Víðari stóð m.a. í lýsingini:

> *"Tú fært sostatt møguleikan at seta dagsskránna í føroyska samfelagnum í einum spennandi og fjølbroyttum starvi við nógvum avbjóðingum...*
>
> *Aktuelt hevur egna rakstrarætlan, og sum deildarleiðari hevur tú fíggjarliga ábyrgd og skal tryggja, at fíggjarætlanin heldur...*
>
> *Leiðarin á deildini Aktuelt er partur av leiðsluni og vísir beinleiðis til stjóran.*
>
> *Ábyrgdarkrøv*
>
> - *Leiða og menna tíðindatænastu stovnsins*

- *Tryggja at tíðindini eru viðkomandi, álitandi, óheft, kritisk og skjót*
- *Tryggja at journalistikkurin á okkara miðlapallum er í støðugari menning"*

Orsøk er ikki til at halda, at starvið hjá kæraranum er týðandi broytt í mun til starvslýsingina, í tíðarskeiðnum meðan kærarin hevur røkt starvið sum *"Leiðari á Aktuelt"*.

Kærarin fekk 24. mai 2018 boð um, at kringvarpsstjórin hevði gjørt av at *flyta* hana í annað starv. Av skrivinum til kæraran framgekk m.a., at *"Talan er ikki um eina uppsøgn, men um eina flyting innan setanarøkið."*

Sum útgangsstøði hevur arbeiðsgevari altíð heimild til at leggja til rættis og umleggja arbeiðið hjá starvsfólki eftir tørvi. Avgerðir sum verða tiknar sum partur av vanliga leiðslurættinum eru ikki fyrisitingarligar avgerðir.

Er hinvegin talan um týðandi broytingar í starvinum, ella verða broytingarnar framdar sum liður í einari setanarrættarligari atgerð, sum er grundað á, at eitthvørt er at lasta starvsfólkinum, er tó talan um eina fyrisitingarliga avgerð, sum skal lúka treytirnar fyri slíkar.

Mett verður, at avgerðin um at flyta kæraran úr starvinum sum *"Leiðari fyri Aktuelt"* til eitt akademiskt starv í KvF, við teimum í dagførda ætlanarskrivinum frá 7. mai 2018 nærri nágreinaðu uppgávunum, má metast at vera ein so týðandi broyting av starvinum hjá kæraranum, at hon ikki kann takast innanfyri vanliga leiðslurættin. Vísandi til hetta kann KvF ikki við heimild í vanliga leiðslurættinum áleggja kæraranum at taka undir við broytingini.

Ein ætlan um at broyta starvið hjá kæraranum, soleiðis sum fráboðað var í dagførda ætlanarskrivinum, dagfest 7. mai 2018, eigur sostatt at metast sum ein ætlan um at siga kæraran úr starvi sum *"Leiðari fyri Aktuelt"* - við samstundis tilboði um eitt nýtt akademiskt starv í KvF. Ein slík ætlan kann bert fremjast sambært reglunum um uppsøgn.

Ein uppsøgn er ein fyrisitingarlig avgerð, sum skal vera sakliga grundað. Uppsøgnin skal vera viðgjørd sambært fyrisitingarlógini, og hon skal lúka treytirnar sambært fyrisitingarligu meginreglunum og góðum fyrisitingarsiði. Hartil skulu ásetingarnar í galdandi kollektiva sáttmálanum verða fylgdar. Áðrenn avgerð um uppsøgn verður tikin skal starvsfólkið harumframt hava møguleika at kanna eftir og gera viðmerkingar til avgerðargrundarlagið.

Vísandi til, at talan í hesum førinum er um eina setanarrættarliga atgerð, sum er grundað á, at nakað er at lasta starvsfólkinum, er harumframt krav um eina víðkaða partshoyring. Víðkað partshoyring áleggur setanarmyndugleikanum at partshoyra um tær faktisku umstøðurnar, umframt hvussu setanarmyndugleikin hevur mett um próvtilfar og rættarligar spurningar í málinum. Boðast skal eisini frá, hvørja støðu setanarmyndugleikin hevur til teir rættarligu spurningarnar í málinum, herundir tær rættarreglur, ið verða brúktar, og hvussu tær verða brúktar í málinum.

Røtt mannagongd í hesum málinum vildi sostatt verið, at KvF gav kæraranum eitt ætlanarskriv um uppsøgn úr starvinum sum *"Leiðari fyri aktuelt"*, samstundis sum kærarin fekk tilboð um eitt nýtt starv. Hetta hevði havt við sær, at um kærarin ikki tók við nýggja starvinum, var hon at rokna sum uppsøgd av KvF sambært galdandi reglum.

MMR staðfesti í avgerðini, dagfest 20. apríl 2018, viðvíkjandi kæruni av upprunaligu uppsøgnini av kæraranum m.a., at kærarin hevði ikki sýnt rættan leiðsluatburð, og at kærarin tí hevði sett trúvirðið hjá stovninum í váða. Hóast slíkur atburður kann hava við sær starvsfólkarættarligar avleiðingar, metti MMR ikki, at tað var í samsvari við fyrisitingarrættarliga proportionalitetsprinsippið, at KvF ikki hevði roynt aðrar minni víðfevndar loysnir, áðrenn farið varð undir at siga kæraran úr starvi. Vísandi hertil avgjørdi MMR at ógilda avgerðina hjá KvF um at siga kæraran úr starvi við fríttstilling í uppsagnartíðarskeiðinum.

Við støði í teimum upplýsingunum sum fyriliggja í málinum verður í útgangsstøðinum mett, at ein møgulig ætlan hjá KvF um at siga kæraranum úr starvi sum *"Leiðari fyri Aktuelt"* og samstundis bjóða henni eitt annað hóskandi starv, helst hevði verið eitt proportionalt stig at tikið sæð í ljósinum av staðfestu brotunum, sbr. m.a. U.2002.1118Ø og U.2003.1660H.

MMR hevur ikki orsøk til at seta til síðis metingina hjá KvF um, at atburðurin hjá kæraranum hevur viðført, at stjórin á KvF misti álitið á kæraran sum *"Leiðara fyri Aktuelt"*. MMR hevur heldur ongar viðmerkingar til ætlanina hjá KvF um, at kærarin í staðin skal røkja aðrar uppgávur innan tíðindaøkið á stovninum. Ein so týðandi broyting í starvinum hjá kæraranum má tó gerast á rættan hátt sambært starvsfólkarættinum og fyrisitingarrættinum.

Tað kann ikki avvísast, at úrslitið av partshoyringini hevði verið øðrvísi, um KvF í staðin fyri at ætla at *"flyta"* kæraran í annað starv, heldur ætlaði at siga kæraranum úr starvi sum *"Leiðari fyri aktuelt"* og samstundis bjóðaði henni eitt annað hóskandi starv.

**Avgerð**
Vísandi til omanfyri standandi fer MMR við hesum at heimvísa málið til KvF til nýggja viðgerð.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

Torkil V. Rasmussen
*løgfrøðingur*